## Millumtekstleiki

Er nakað millumtekstasamband í yrkingini?

Kennir tú aðrar tekstir (søgur, myndir, filmir ella annað), ið viðgera sama evni? Greið frá teimum.

## Boðskapur/hugburður

Hevur yrkingin ein serligan boðskap til lesaran?

## Tín hugsan

Hvat heldur tú um hesa yrkingina? Gev grundir fyri tínum sjónarmiðum.

Er yrkingin viðkomandi fyri okkum í dag? Hví/hví ikki?

## Orðafrágreiðingar:

*Klassisk yrking*: er ofta ein yrking úr eldri tíð og er eyðkend av reglubundnum rímum

*Modernað yrking*: er ofta ein yngri yrking, ið er yrkt í fríum formi (fá ella eingi rím) og hevur ofta persónligt myndamál.

*Lýrisk yrking*: kensluborin yrking, ið lýsir kenslur og huglag.

*Episk yrking*: frásøgukend yrking.

*Rím:* Dømi um *heilrím* (tað at bæði sjálvljóð og eftirfylgjandi hjáljóð bera upp á rím): orð – norð. *Hálvrím* (tað at bert sjálvljóð bera upp á rím): tók – bót.

*Endarím* (endaorðini á reglunum ríma): Sirmar á *gøtu* – skýmir á *fløtu*.

*Stavrím* (tá fleiri orð byrja við sama hjáljóði): Bert er bróðurleyst bak.

*Krossrím* (onnur hvør regla rímar – abab - eisini nevnt *flættirím*). Dømi úr yrking eftir Hans A. Djurhuus:

eg elski tíni eygu, tey droymandi **bláu**, a

eg elski tínar varrar, teirra fríska reyða **lit** b

tær góvu mær so mangan ta fagrastu **gávu**, a

ið styrkir og vekur bæði vónir og **vit**. b

*Endurtøkur* (verður brúkt í yrkingum og tekstum fyri at leggja herðslu á og skapa rytmu): Dømi úr yrking eftir Hans A. Djurhuus:

eg elski tíni eygu, tey droymandi bláu,

eg elski tínar varrar, teirra fríska reyða lit

*Jalig* orð (orð við positivari merking - eisini nevnd pluss-orð): fittur, eygnasteinur, hálova og rósa.

*Neilig* orð (orð við negativari merking - eisini nevnd minus-orð): óreinur, bartrog, sleyga og baktala.

*Hjátýdningur* (eisini nevnt konnotatión): eykamerking, t.d. bartrog fyri mann.

*Ítøkilig orð* (eisini nevnd denotatión): neutral orð uttan eykamerking, t.d. maður.

*Myndburður*: Flyting av orði úr einari flokking í aðra, soleiðis at orðið fær eina flutta merking. Dømi: *Hann* er ein *arbeiðshestur*.

*Samanbering*: Skúlin er *sum* eitt fongsul.

*Sálarkveiking*: Náttúra og lutir hava menniskjansligar eginleikar. Dømi: Kavafonnin *grætur*.

*Persónsgerð*: Hugtøk fáa menniskjansligar eginleikar. Dømi: *Deyðin* við líggjanum kom.

*Ímynd* (eisini nevnt symbol): *Dúgvan* er ímynd ella symbol fyri *frið*.

*Grafisk mynd* (uppsetingin av yrkingini): Ein yrking kann vera sett upp á serligan hátt, so uppseting og innihald smelta saman. Dømi:

Eg

Er eri

Eg eri eitt

Eg eri eitt jólatræ

Eg